Løgtingslóg
um
broyting í løgtingslóg um Virkisskrá
(Dagføring av listanum yvir grundardátur og útflýggjan av p-talinum)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 70 frá 9. mai 2019 um Virkisskrá, verða gjørdar hesar broytingar:

1. § 2, nr. 3 verður orðað soleiðis:
"3) gera grundardátur tøkar, sbrt. § 15."

2. Í § 3, nr. 1 verður "og hevur ein umsetning yvir 30.000 kr.," strikað.

3. § 8, stk. 1, nr. 12 verður strikað.
Nr. 13-16 verða eftir hetta nr. 12-15.

4. Í § 8, stk. 1 verða sum nr. 16 og 17 sett:
"16) Eigaraupplýsingar.
17) Roknskaparár."

5. § 8, stk. 2, nr. 9 verður strikað.
Nr. 10 og 11 verða eftir hetta nr. 9 og 10.

6. § 8, stk. 3, nr. 9 verður strikað.
Nr. 10 verður eftir hetta nr. 9.

7. § 15, stk. 2 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 2.* Privat kunnu bert fáa útflýggjað p-tøl úr Virkisskránni samsvarandi løgtingslóg um vernd av persónupplýsingum."

8. § 15, stk. 3-5 verða strikað.
Stk. 6 verður eftir hetta stk. 3.

9. §§ 16 og 17 og yvirskriftirnar yvir §§ 16 og 17 verða strikaðar.

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Samtykt á Løgtingi hin 7. mai 2024 við 32-0-0 atkvøðum.

forkvinna

/

/

skrivari

Borið saman við samtykta løgtingslógaruppskotið og funnið beint.

Á LØGTINGI, 13. mai 2024

stjóri

LM-078/2023